

Mynd: Statoil

# Føroyingar njóta helst ágóðan av Statoil-viðlíkahaldi fyri 24 milliardir krónur

**Jógvan Hugo Gardar**

15.12.2015 - 09:44

Oljan.fo

Statoil boðar í eini kunning til keypsskálan í morgun frá at avtalur eru gjørdar við fleiri fyritøkur um at gera ymisk viðlíkahalda- og tillagingararbeiði fyri norska oljurisan.

Hetta er eitt øki sum føroyskar fyritøkur higartil hava verið kappingarførar innanfyri, og eftir hvat vit hava skilt í morgun, so kunnu helst fleiri av teimum mongu føroyingunum sum arbeiða við viðlíkahaldi og tillaging rokna við at fáa nokk at gera framyvir eisini.

Talan er um uppgávur fyri umleið 24 milliardir krónur. Arbeiðini skulu gerast á boripallunum sum Statoil hevur á norska landgrunninum, umframt á anleggunum sum liggja á Sture, Kollsnes, Kårstø og Melkøya.

Uppgávurnar umfata arbeiði sum skulu gerast komandi seks árini, og fleiri av avtalunum kunnu leingjast við fýra árum. Millum fyritøkurnar sum hava fingið hesi hugaligu boðini beint áðrenn jól eru Aibel, Apply Sørco, Reinertsen og Wood Group Mustang Norway.

Tær flestu av avtalunum sum eru undirskrivaðar eru galdandi frá á vári 2016.

LES EISINI: Pam Offshore: Statoil-avtalurnar síggja spennandi út